– trygt og ómakaleyst til hús

# Frálíkt raðhús í Hoyvík



Vilt tú búgva væl og ómakaleyst í góðum umhvørvi, so er sera snøgga raðhúsið í Hoyvík ein góður møguleiki.









## Uttanfyri

Tá ið tú koyrir niðan Løgmannabreyt, snarar tú til høgru inn í Maritugøtu og síðani til vinstru. Økið er alt liðugt gjørt – snøgt og snotiligt. Við síðuna av er parkeringspláss, og nær við liggur Karlamagnusarbreyt við komandi møguleikum og tænastum. Húsini standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi við góðum sólargangi og við sera góðum grannalagi, við mongum tilboðum og møguleikum fyri felags virksemi. Har er sera barnavinaligt við spæliplássi og FIFA-vølli so at siga beint uttan fyri stovuvindeygað. Dagsstovnar, býlingshús og felags grillpláss er beint við, og bilfrí gøta er millum býlingarnar og oman til skúla, kirkju, handil, bussamband m.v. Nakað av útsýni er út á fjørðin.

## Innanfyri

Tá ið tú kemur til húsini er snøgt tún í gerð frammanfyri, og beint við hurðina er snøgt amboðsrúm við gólvhita. Komin inn varnast tú straks, at her er talan um dygd. Her er alt gjørt úr besta tilfari við besta handverki. Vindeyguni eru stór, so tú fært nógv ljós inn. Út frá stovuni kanst tú fara út í nýgjørda garðin / urtagarðin við stóru markisuni yvir alla longdina á húsinum, so tú kanst njóta útilívið á útigólvinum / terassuni. Rúmini eru snøgg og ljós, og húsini eru alt í alt sera livilig. Tað er ein fragd at seta innbúgvið inn í slíkar karmar, og tær nýtist einki stórvegis at gera. Alt er sum tað eigur at vera. Gott pláss er á ovasta lofti við tøttum tróðri at goyma ymiskt. Betonveggir eru millum íbúðirnar og betondekk dekk millum hæddirnar, so ikki hoyrist millum. Húsini er sera væl hildin og viðfarin, so tey eru sum nýggj.

## Innrætting

Í niðaru hædd er úthús / goymslurúm, inngongd, gongd, vaskirúm / wc, køkur / alrúm / stova við útgongd til útigólv / terassu við stórari sjálvvirkandi markisu. Í ovaru hædd er trappugongd / trappupallur, hjúnarrúm, baðirúm við kari og brúsu og 2 stór kømur. Snøggur garður við útigólvi og stórari sjálvvirkandi markisu á 7m x 5m er á húsinum aftanfyri.

## Fakta

Addressa: ...........Maritugøta 28, Hoyvík
Byggiár: .............2004
Hæddir: ..............2
Gólvvídd: ............uml. 120 m²
Grundøki: ...........137 m²
Prísuppskot: .....kr. 2.100.000











PF INNI
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**